

Kvitbjørn stendur føst á einum flúri.

# Kvitbjørn er skumpað av flúrinum aftur

**Jógvan Hugo Gardar**

29.06.2015 - 08:30

Oljan.fo

Tað gekk betri enn fleiri høvdu mett at fáa Kvitbjørn av aftur flúrinum sum hann rendi seg fastan á sunnumorgunin.

Í gjárkvøldið tá flóðin var við at vera uppá tað hægsta setti ein lítil sleiåibátur gronina móti síðuni á Kvitbjørn og fekk skumpað stóra góðsskipið av flúrinum.

Stjórin í reiðarínum DSD, Ingvald Løyning, ið eigur NorLines, sigur við Vikebladet at tað hevur gingist betri enn ein kundi óttast, tá óhappi hendi.

Hann segði eisini at illgruni er um at okkurt tekniskt ikki hevur rigga sum tað skal, tí skipið boytti bráddliga kós og silgdi framvið fleiri flúrum áðdrenn hann rendi seg fastan.

Hendingin var beint norðanfyri Ullsteinvik, har Rolls-Royce, ið hevur havt ábyrgdina av byggingini av skipinum, heldur til, og Kvitbjørn liggur nú har til kanningar. Tað skal ikki vera komið hol á skrokkin, og skaðin skal vera avmarkaður.

LES EISINI: Nýtt føroyskt skip fór á land í Noregi í morgun